# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI SETHÚSAÚTSTYKKING VIÐ KLINGURSTJØRN

Hendan serstaka byggisamtykt hevur til endamáls at skipa útstykking til sethús, sum er í umbúna, við Klingurstjørn á Argjum. Stykkja verður út í tveimum stigum, Klingurstjørn I og Klingurstjørn II.

Økið, sum verður útstykkja, er partur av matr. nr. 255a, Argir og liggur í umráðispartinum A3 í 3 grundumráði.

Samlaða økið er uml. 93.000 $m^2$ til støddar.

Útstykkingin fevnir um 93 grundstykkir uml. 400 $m^2$ til støddar, trý fríøkir á tilsamans uml. 1.300 $m^2$ og fýra felags parkeringsøkir á tilsamans uml. 1.600 $m^2$.

Fyri viðurskifti sum ikki eru skipaði í hesi byggisamtyktini, er almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til sethúsaøki.

1.2 at tryggja, at skipanin av økinum, verður sum sýnt í kortskjali 1 og 2.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og 2, og part av matr. nr. 255a, Argir

2.3 Økið liggur í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV §7, í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, er A3-øki í 3. grundumráði lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvi er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

2.5 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri hvørt stakhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, eru 93 grundøkir á uml. 400 $m^2$, trý fríøkir á tilsamans uml. 1.300 $m^2$ og 4 felags parkeringspláss á tilsamans 1.600 $m^2$ við plássi til uml. 72 bilar

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Mest loyvda byggistig 0,3. Niðanfyri vegin kann 0,1 leggjast afturat byggistiginum, sum bert kann brúkast til kjallara undir bilhúsi.

4.2 Mest loyvda nýtslustig 0,8

4.3 Útrokning av nýtslustigið er samsvarandi kap. IV, § 27, stk. 4 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

4.4 Mest loyvdu hæddir:

Omanfyri vegin:
- Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna, mált frá planeringshædd. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Hús við sløttum taki mugu ikki verða hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg, mált frá planeringshædd.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m, mált frá planeringshædd.
- Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.

Niðanfyri vegin:
- Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 7 m til mønuna, mált frá planeringshædd. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Hús við sløttum taki mugu ikki verða hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg, mált frá planeringshædd.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli, takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7 m, mált frá planeringshædd.
- Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.

4.5 Loyvt er at byggja kvistar á báðum síðum, tó í mesta lagi helvtina av longdini av húsunum.

4.6 Loyvt er at byggja eini hús í trimum hæddum, har 3 hæddin er í mesta lagi 50% av hæddini niðanfyri t.d. sambært niðanfyristandandi mynd


Sethús við lofti og kvistum


Sethús í trimum hæddum

4.7 Frástøðan frá grannamarki skal verða sambært kapIV, § 28. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

4.8 Sethús omanfyri vegin mugu ikki byggja nærri enn 5 m frá vegi.

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

5.1 Vegir skulu gerast sambært galdandi donskum/norskum vegnormum

5.2 Fýra felags parkeringsøkir til tilsamans umleið 72 pláss.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

6.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 18/01025 |
| Ætlanarskriv: | 22/1-2019 |
| Góðkent: | 24/1-2019 |
| Váttað: | [signature] |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Klingurstjørn | | | | |
| **Undirheiti** | Yvirlitskort | | | | |
| **Tekning nr.** | 1 | | | | |
| **Dagur** | 22.01.2019 | **Mát** | 1:5.000 | **Tekna** | RVH |




## Tórshavnar Kommuna
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Klingurstjørn | | | | |
| **Undirheiti** | Skipan | | | | |
| **Tekning nr.** | 2 | | | | |
| **Dagur** | 22.01.2019 | **Mát** | 1:3400 | **Tekna** | RVH |

**HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ**

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

24. januar 2019
**Mál**: 18/01025-7
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

**Broyting av serstøku byggisamtyktini undir Kongavarða (Klingurstjørn)**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 22. november 2018, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til broyting av serstøku byggisamtyktini undir Kongavarða til góðkenningar.

Broytingin snýr seg um, at økið sum serstaka byggisamtyktin undir Kongavarða fevnir um, verður víðkað til eisini at fevna um seinna part av útstykkingini, sum Tórshavnar kommuna stendur fyri. Samstundis verður heitið á serstøku byggisamtyktini broytt til *Serstaka byggisamtyktin fyri Klingurstjørn*.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 8. oktober til 19. november 2018. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 19. november 2018, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum, dagfest 10. januar 2019, til, at broytingin verður góðkend uttan viðmerkingar.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina av serstøku byggisamtyktini undir Kongavarða (Klingurstjørn), sum omanfyri nevnt.

Mint verður á, at hóast Heilsu- og innlendismálaráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguliga aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt rættað byggisamtyktartekstur við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo